B36-KÍ 7-1 (2-0):

# Knústir klaksvíkingar




*Úrslitið sigur at B36 var flúgvandi sunnudagin, men dysturin bendi eins nógv – ella kanska meira á – at tað fyrst og fremst var eitt søkkandi KÍ-lið, sum fullkomuliga gav skarvin yvir*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Triðju ferð í trimum dystum móti B36 datt KÍ í kontrafelluna hjá B36, sum soleiðis enn einaferð kundi dusa sær í møguleikum og vinna stórsigur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Klaksvíkingar høvdu eina manssterka áskoðarafjøld aftan fyri seg, tá teir vitjaðu í Gundadali í dag. Nýstovnaða áskoðarafelagið í Klaksvík hevði sjálvandi skipað fyri ferð til Havnar, og serliga útisetafelagið við KÍ'arum í Havn hevði sjálvsagt eisini gjørt sítt til, at dysturin skuldi hava góðar karmar. Niðara hæddin í HB-húsinum var samstundis fingin til láns, soleiðis at upphitingin skuldi eisini verið í lagi.

Rómurin í gamla skýlinum, har klaksvíkingarnir savnaðust, var eisini góður, tá blást varð ígongd, men tað var tó skjótt, at hvíta húsið yvirav fekk nakað at fegnast um.

### 90 sekund

Tað gingu nevnliga ikki meira enn góð 90 sekund, áðrenn ein av klaksvíkingunum hjá B36, Allan Mørkøre, hevði bankað bóltin upp í málhornið, og frá teirri løtu var nógv, sum bendi á, at hetta kundi fara at minna um steypakappingina, har B36 í tveimum umførum vant burturúr KÍ.

Tí hóast tað framvegis vóru 88 minuttir eftir at spæla, tá KÍ nú gav bóltin uppaftur, so tóktist liðið fullkomuliga at fara í panikk. Heldur enn at sláa kalt vatn í blóðið, varð alt fyri eitt roynt at flyta nógv fólk niðan á vøllin, fyri á tann hátt at skapa eitt trýst á B36 málið. Hetta seinna eydnaðist ongantíð, men flytingin av fólkinum hevði hinvegin við sær, at B36 fekk ríviligt av bæði plássi og tíð at spæla kontrabólt.

Avleiðingin av fólkaflytingini var nevnliga, at flata fýrara-ketan hjá KÍ støðugt lág uppi á miðjum vølli, móti einum álopi sum tí hjá B36 er hetta ikki nakað, sum tú bara gert uttan víðari. Við John Petersen sum meistara at halda bóltunum, sum vórðu sendir fram, og so Heðin á Lakjuni og Jákup á Borg at renna eftir stikningunum, tóktist tað bert vera ein spurningur um tíð, hepni og einamest nærlagni, áðrenn B36 økti, men onkursvegna hendi hetta bert eina ferð fyri steðgin. Einamest tí havnarmenninir vóru so altráðir eftir kontramøguleikunum, at teir óteljandi ferðir voru ov skjótir inn um fløtu verjuna við eftirfylgjandi rangstøðudómum sum fylgju.

### Stóra skrædlið

Við tveimum málum framman fyri hevði B36 í øllum førum stóran fyrimun, tá farið varð út til seinna hálvleik, men tó at nógv mundu halda, at her var alt avgjørt, so so eru tvey mál ikki meira enn so, at tey kunnu vinnast innaftur.Úrslitið talar fyri seg, at tað var so langt ífrá, at hetta hendi, og frágreiðingin til skrædlið, sum nú kom, er sum so sera einføld.

Tað vísti seg nevnliga, at KÍ at kalla als einki hevði lært av lemjandi ósigrunum fyri júst B36 í steypakappingini, og heldur ikki høvdu teir lært nakað av fyrstu trimum korterunum sunnudagin.

Við báðum beinum fremst lupu teir tvørturímóti beina leið í felluna, sum B36 nú setti triðju ferð á rað. Og sum um hetta ikki var nóg mikið, so hjálptu teir eisini væl til sjálvir, tá teir stutt inn í seinna hálvleik fluttu Ova Nysted úr verjuni og niðan í álopið.

Hendan taktiska broyting var samstundis ein deyðssýnd, tí tilhoyrandi útskiftingarnar vórðu framdar, tá B36 hevði hornaspark, og áðrenn KÍ-verjan hevði skipaði seg aftur, stútaði ein púra leysur Jens Kristian Hansen B36 upp á 3-0, og so gekk skjótt. At gestirnir eisini gjørdust mótfalnir, soleiðis at rásarúmið hjá B36 bara øktist í takt við at málini skolaðu inn, bøtti sjálvsagt ikki um støðuna, og sum tíðin leið var alt bara ein spurningur um, hvussu nógv mál B36 skuldi fáa, og kanska eisini um Rúni Elttør sum triði klaksvikingurin á havnarliðnum eisini skuldi sleppa upp í part í málskjótingini.

Klaksvíkingar sjálvir høvdu valla ein einasta veruliga málmøguleika í dystinum. Vandi var tó á ferð nakra ferðir, tá bóltar vórðu sendir innfyri úr høgru, ella tá talan var um deyðbóltsstøður, men B36-málverjin hevði ikki fyri neyðini at gera eina einastu bjarging í dystinum, og tó at KÍ at enda fekk »pyntað« um úrslitið, so mundi eyðmýkingin ikki kennast minni av teirri orsøk.

Hjá B36 mundi trivaligi sigurin – tó at bakgrundin var bílig – koma sera væl við. Liðið hevur komandi vikuskifti dyst móti NSÍ, áðrenn grannarnir úr HB bíða, og tað verða hesir dystir, sum gera av, hvørt B36 skal fara í summarfrí sum partur av oddinum ella ikki.

Hjá KÍ má støðan skjótt vera tann, at liðið tekur við læru av gjørdum mistøkum. Komandi vikuskifti taka teir ímóti vágamonnum, sum hava víst gott hegni til kontraspæl, og finna klaksvíkingar ikki okkurt mótvapn mótvegis hesum, kann tað gerast meira enn trupult at fáa nakað stig til høldar í tí dystinum.

### Dysturin í tølum

**B36-KÍ 7-1 (2-0)**
1-0: Allan Mørkøre
2-0: John Petersen
3-0: Jens Kristian Hansen
4-0: Heðin á Lakjuni
5-0: Jákup á Borg
6-0: Jens Kristian Hansen
7-0: Sonni Johansen
7-1: Ove Nysted
**Dómari:** Oddmar Andreasen. Lat fyri mesta leikararnar fáa frið at nýta kropin, og tó at okkurt kundi verið floytað øðrvísi, kom hann sum heild væl frá dystinum.
**B36:** René Tórgarð - Allan Mørkøre, Pól Thorsteinsson, Rúni Elttør, Kenneth Jacobsen – Niels Joensen, Klæmint Matras, Jákup á Borg, Jens Kristian Hansen – John Petersen, Heðin á Lakjuni
**KÍ:** Karsten Joensen – Harley Bertholdsen, Ove Nysted, Sámal Eyðfinn á Akursmørk, Símun Joensen – Atli Danielsen, Allan Joensen, Fríðin Ziskason, Leon Bjartalíð, Hjalgrím Elttør – Eyðunn Klakstein

## Málini

**1-0: Allan Mørkøre, 2 min**
B36 horna verður tikið stutt út til Jákup á Borg, sum leggur longur aftur til Allan. Hann dregur einaferð, áðrenn hann langar bóltin upp í handara málhorn uttan nakran sum helst møguleika hjá Karsten Joensen.

**2-0: John Petersen, 28 min**
Klæmint Matras sendir Jákup á Borg avstað í høgra borði. Hesin leggur bóltin inn til ein fullkomuliga leysan John Petersen, sum leggur bóltin á undirsíðuna av tvørtrænum og inn.

**3-0: Jens Kristian Hansen, 54 min**
Heðin av Lakjuni sendir horna inn úr høgru. KÍ hevur júst framt tvær útskiftingar, og liðið hevur enn ikki skipað seg, soleiðis at Jens Kristian púra leysur kann stúta bóltin í málið.

**4-0: Heðin á Lakjuni, 72 min**
Eftir skjótt spælt B36 kontra fær Jákup á Borg lagt flatt inn fyri úr høgru. Bólturin rullar fram við trimum leikarum og endar hjá Heðini, sum knallar til fyrstu ferð og í handara síðunet.

**5-0: Jákup á Borg, 73 min**
Rúni Elttør sparkar úr verjuni. John Petersen leingir og so er Jákup leysur og kann av brotsteigarmarkinum senda bóltin flatt í málið.

**6-0: Jens Kristian Hansen, 76 min**
Ein sera sjónligur Allan Mørkøre leggur innfyri úr høgru. Heðin á Lakjuni leggur bóltin niður og útfrá, har Jens Kristian Hansen við vinstra beininum sparkar flatt niður móti handara stólpa.

**7-0: Sonni Johansen, 86 min**
Allan Mørkøre spælir eitt-tvey við Jákup á Borg í høgra borði. Sleppur inn um KÍ verjuna og sendir flatt inn, har júst innskifti Sonni Johansen kann sparka inn við nærmasta stólpa.

**7-1: Ove Nysted, 90 min**
Tíðin er um at vera runnin, tá Alti Danielsen sendir hornaspark innfyri. Har er Ove Nysted hægstur og stútar inn. B36 klárar akkurát at geva bólti upp, áðrenn dómarin bríkslar fyri seinastu ferð.



B68–FS Vágar 0-1 (0-0):

# Ætlaðu sær eitt og fingu trý

**Vágamenn eru meiri enn væl nøgdir eftir ferðina á Svangaskarði, har B68 í 2. hálvleiki var ringast við seg sjálvt**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Vágamenn lúrdu alla tíðina eftir kontra-møguleikunum, og tó at B68 til tíðir trýsti nógv, so hepnaðist spæliætlanin hjá gestunum til fulnar*

Á Toftum slikka teir sárini. Fyri fyrstu ferð nakrantíð taptu teir sunnudagin stig ímóti FS Vágum. Og teir taptu ikki bara eitt, men gestirnir fóru avstað við øllum trimum stigunum.

At vágamenn vóru ovur fegnir var einki at siga til.

– Vit fóru á Svangaskarð við tí í kvittanum, at vit skuldu halda tørn um málleysa javnleikin. Úrslitini higartil í ár hava sagt okkum, at B68 hevur havt trupult við at fáa mál. Tá ið tað harafturat tíðliga í 2. hálvleiki eydnaðist okkum at leggja okkum á odda, snúði tað seg uppaftur meiri um at halda tørn. B68arnir trýstu og trýstu, og tað bar við sær, at tað gjørdist tunnligt í verjuni hjá teimum. Serliga eftir at Hans Fróði Hansen var útvístur, var onkra ferðina um reppið, at vit komu ígjøgnum í snarálopum.

Tað er ein sera vøl nøgdur Albert Ellefsen í Miðvági, sum vit hava í telefonini. Hann hevur aftur og aftur sagt, at FS Vágar hevur fólk til at vera við í kappingini aðra staðni enn at stríðast fyri at sleppa undan niðurflytingini, og tað heldur hann, at úrslitið sunnudagin bar boð um.

– Men tað kundi havt gingið heilt øðrvísi hjá okkum. Fyrstu 25 minuttirnar vóru vit so at siga ikki frammanfyri miðstrikuna. Teir høvdu bóltin mest sum alla tíðina, og teir spældu væl. Teir høvdu málmøguleikar, eitt nú tá ið Øssur Hansen sendi fríspark í stólpan, og tá ið Fróði Benjaminsen sendi dygst framvið, eftir at hann í eitt tvey samanspæli var komin ígjøgnum, men teir høvdu trupulleikar, og vit trúðu upp á møguleikan, sigur Albert Ellefsen.

At tað kundi bera til hjá FS Vágum fingu teir ábending um fyrstu ferð, tá ið teir fóru í álop. Clayton Soares varð spældur púra leysur, men hann var óheppin at glíða, tá ið hann skuldi gera seinasta vørrin og seta bóltin framvið B68 málverjanum. Tvær aðrar ferðir síðstu løtuna av fyrra umfarinum vóru ábendingar um, at tað kanska kundi gerast vandamikið hjá teimum reyðu, tí teir bláu og hvítu vóru tætt við.

### Í vágahøvdini

Góðar tveir minuttir eftir steðgin fekk B68 mønustingin. Jens Erik Rasmussen spældi Clayton leysan, hann sneiddi framvið B68 málverjanum, sum var komin meiri ella minni í millumstøðu, dragingin var fram ímóti baklinjuni í høgru, men brasiliumaðurin megnaði at senda innfyri málið, har miðvallarin Elfinn Ørvarodd var frammanfyri B68 verjuspælararnar og stýrdi bóltinum í málið, sum í síðsta enda bar trý stig við sær.

B68 var skelkað. Teir royndu at leggja trýst á, men leingi var ikki nógv bit í. Hugflogið minkaði, og síðstu løtuna vóru tað fyri tað mesta langar skrásendingar í brotsteigin. Har var Jákup Joensen, FSV málverjin, góður í luftkrígnum, og luftstríðið var eisini matur fyri Jóhannis Joensen, Albert Ari Thomassen og Vlad Osipov, sum ikki høvdu stórvegis trupulleikar ímóti framrættaðu heimamonnunum.

Hans Fróði Hansen átti kanska at havt verið gylta álopsvápnið, tá ið javnleikurin skuldi bjargast til B68, men tá var hann ikki á vøllinum. Ivaleyst mundi tað vera frustratión, tá ið roydi verjumaðurin tjúgu minuttir undan dystarenda vísti linjuverjanum fingurin, tí dómurin gekk heimaliðnum ímóti. Reglurnar siga, at sovornum skulu ansingarmenninir ikki finna seg í, og tí varð ostaskorpan tikin úr lummanum. Tað kostaði dýrt síðstu minuttirnar. Og kostnaðurin verður ikki minni, tá ið B68 sunnudagin fer at fáa vitjan av HB.

### Dysturin í tølum

**B68–FS Vágar 0–1 (0–0)**
0–1: Elfinn Ørvarodd 48.
**B68:** Albert Sævarson – Dánial Hansen, Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen – Bogi Petersen, Jann Ingi Petersen (Kristian Poulsen, 87.), Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, John Heri Dam (Jóhan Dávur Højgaard, 89.) – Súni Fríði Johannesen, Kristian Anton Andreasen (Jóhan Petur Poulsen, 57.)
Reytt kort: Hans Fróði Hansen 71.
**FS Vágar:** Jákup Joensen – Sjúrður Ellefsen, Jóhannis Joensen, Vlad Osipovs, Albert Ari Thomassen – Elfinn Ørvarodd, Rói Árting (Birgir Joensen, 86.), Jens Erik Rasmussen, Ruslan Screlea, Silva de Braga (Jógvan H. Samuelsen, 5.) – Clayton Soares
**Gult kort:** Jógvan H. Samuelsen 67., Jákup Joensen 90.
**Dómari:** Dagfinn Olsen

# Føroyingar skulu avloysa Sharpe

**Jákup á Borg og Hjalgrím Elttør standa ovastir á ynskislistanum hjá íslendska Grindavík**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at Julian Johnsson fyri stuttum skifti til íslendska ÍA, tykjast íslendingar av nýggjum hava fingið eyguni upp fyri føroyskum fótbóltsleikarum. Nakað sum annars ikki hevur verið aktuelt seinastu tvey árini. Ikki minst tí fíggjarligu royndirnar av hesum ævintýrum hava verið sera misjavnar, og at tað langt ífrá er altíð, at leikararnir hava fingið tað, sum teimum hevur verið lovað.

Íslendsku bløðini skriva í dag, at Grindavík heldur enn gjarna vil hava hendur á antin Jákup á Borg ella Hjalgrím Elttør til at avloysa Lee Sharpe, sum nú er givin í felagnum. Jú, talan er um sama Lee Sharpe, sum fyrst í níti-árunum taldist við í gylta ættarliðnum hjá Manchester United, og sum eitt skifti stóð somikið fastur á vinstra veingi, at Alex Ferguson hevði ikki annað val enn at flyta Ryan Giggs yvir á hitt borðið, fyri at rúm skuldi vera fyri báðum.

Síðani gekk tó niður eftir hjá Sharpe. Njótandi lívsstílur hansara sampakkaði ikki serliga væl við strongu krøvnini, sum Sir Alex setir. Niðurtúrurin byrjaði við eini sølu til Leeds, víðari til italska Sampdoria, aftur til enska Bradford, og áðrenn hann fór til Grindavíkar leikt hann eitt skifti í fjórðbestu ensku deildini.

Nú hevur ein skaðasteðgur so noytt hann at gevast í Grindavík, og tí er tað, at teir nú royna at fáa hendur á antin Jákupi ella Hjalgrím.

Sonevnda transfer-vindeyga opnar aftur 15. juli, og sambært Morgunblaðnum ætla grindavíkingar at hava styrkin upp á pláss.

Okkum eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá nøkrum av leikarunum, men sambært formanninum í B36, Kristian á Neystabø, er ikki so nógv nýtt í hesum áhuga.

- Vit fáa javnan fyrispurningar upp á fleiri av landsliðsleikarum okkara, og har er Jákup sjálvandi eitt evni, eins og Hjalgrím ivaleyst er tað hjá KÍ.

- Hvussu verður og ikki við hesum, er eitt sindur ilt at siga, men vit fara sjálvandi ikki at forða leikarum, sum hava møguleika at royna seg uttanlands. Hinvegin ivist eg eitt sindur í, um Grindavík akkurát er rætta staðið hjá ungum leikarum at menna seg, og undir øllum umstøðum verður hetta so ikki aktuelt fyrr enn í summar, tá transfer-vindeygað letur uppaftur, sigur Kristian á Neystabø.